Góðu 8. og 9. floksnæmingar & foreldur/verji 🙂

SSP-bólkurin í økinum VEKS hevur tikið stig til at skipa fyri tiltakinum:

"Náttin er ung"

fríggjakvøldið tann 17 september 2021 á Oyrarbakka.

Hetta er eitt rúsfrítt tiltak, har vit fara at hugna okkum, hava spurnakapping, hoyra góðan live tónleik og savna góð minni saman.

Tiltakið byrjar kl. 19 í Skúlanum við Streymin.

Vit enda **"Náttin er ung" kl. 23:30**

Tiltakið er ókeypis og bussur koyrir ókeypis úr Vestmanna og av Eiði til Oyrarbakka og heim aftur.
Ferðaætlanin er soleiðis:

Tíðirnar eru vegleiðandi

- Vestmanna kl. 18:15 frá Reyða torginum
- Kvívík kl. 18:30 steðgistaðið hjá Bygdaleiðum
- Hósvík kl. 18:50 steðgistaðið hjá Bygdaleiðum
- Hvalvík/ Streymnes kl. 18:55 steðgistøðini hjá Bygdaleiðum
- Oyrarbakki kl. 19
- Eiði kl. 18:40
- Bussurin koyrir heim aftur av Oyrarbakka kl. 23:30

Sølubásur verður, har møguligt verður at keypa pizza, sodavatn og okkurt søtt. Tí er skilagott at hava eitt oyra við sær, um man ynskir at keypa sær okkurt gott.

Ikki er loyvt at hava fartelefonir frammi til tiltakið. Um nakað átrokandi verður ber til at ringja til ein av fyriskiparunum.

Rúsevnir og rúsdrekka er strangliga bannað til tiltakið.

Vit gleða okkum at síggja tykkum øll á Oyrarbakka tann 17 september! 😀

Tilmeldingarfreist til tiltakið er 13.09.2021.

Heilsan

SSP bólkurin í VEKS økinum